# Eyðun & Terji raka seymin á høvdið á Summar Festivalinum

SUMMARFESTIVALUR
*tíðindaskriv*

Føroya bestu poppkomponistar fara at spæla saman á Summar Festivalinum. Á skránni hava teir dygdargott handverk, poleraðan poppmusikk og ein tónahamara, sum rakar seymin beint á høvdið

Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen teljast millum bestu poppkomponistarnar, sum føroyingar eiga. Teir hava skrivað sangir til sín sjálvs og bólkar sum Frændur, Føstufressar og Moirae, og eftir teir liggja perlur sum Mítt Land, Eros, Flýggi til tónleikin, 80'ini og nógvir aðrir framúr góðir sangir.

Fyri nøkrum árum síðani spældu Eyðun og Terji nógv saman, men seinnu árini hava teir hildið hvør sína lið sum tónleikarar. Nú verður aftur møguleiki at hoyra teir spæla saman, tí á Summar Festivalinum fara teir á pallin í góða, gamla lagnum – sum Eyðun og Terji.

Bæði Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen vóru við í Prix Føroyum fyrr í ár, og har endaðu teir í miðdeplinum í einum kjaki um listarligt úttrykk mótvegis handverkið. Handverkið hjá teimum er í topp, og teirra listaraliga úttrykk er nakað av tí besta og mest serstaka sum føroyingar eiga. Teir eru Eyðun Nolsøe og Terji Ramussen og eingin annar.







Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari



KAMPANJUAVSLÁTTUR UPP TIL
45.000 KR
VOLVO
FOR LIFE
VR BILAR



Vit søkja sum skjótast:

**SPEDITØR (LUFTFRAKT) í TÓRSHAVN**

Vit kunnu bjóða:
- sjálvstøðugt arbeiði har høvuðsuppgávan er luftfrakt
- samstarv í einum ungum „toymi" (team)
- avbjóðingar í einum nýstovnaðum føroyskt/donskum felagið

Vit vænta at tú
- hevur arbeitt sum speditør, helst við luftfrakt
- hevur teldukunnleika og dugir at arbeiða í skipaðum viðurskiftum
- ert tænastusinnaður
- hevur áhuga í at byggja upp nýtt virksemi

Vinarliga send tína umsøkn (senest dato) til:

Eystara Bryggja
P.O.Box 3296
FO-110 Tórshavn
Tel: +298 345960
Fax: +298 345952
E-mail: cargo@smyrilbluewater.com
Att: Heðin Joensen / Rene Dahl Olesen

SMYRIL BLUE WATER

*Smyril Blue Water er eitt nýtt flutnings- og speditiónsfelag stovnað av Smyril Line og Blue Water Shipping. Felagið bjóðar flutningsloysnir við skipi og flogfari til og úr Føroyum, Íslandi, Hetlandi, Vesturnoregi og Europeiska meginlandinum.*



